# Hvat er savnið vert

**Á mynt- og telefonkortstevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið, verður millum annað høvi hjá savnarum og øðrum at fáa virðismett bæði søvn og einstakar lutir**

SAVNSSTEVNA
*Jákup Mørk*




*Søgan um følsku tvey krónuna er millum innihaldið á forvitnisligu stevnuni í Norðurlandahúsinum, har tað eisini er møguleiki at ogna sær eitt sergjørt telefonkort*

Leygardagin komandi verður forkunnugt tiltak í Norðurlandahúsinum, tá sokallað Mynt- & Telefonkortsamlara Stevnan 2002 verður sett.

Sum navnið sigur, so er her talan um eina stevnu, sum serstakliga er ætlað teimum, sum hava til ítriv at savna upp á myndir og/ella telefonkort, men ivaleyst er tað eisini so, at hetta er ein stevna, sum hevur áhuga fyri savnarar av alskyns slag. Her hava tey kanska møguleika at skifta um savnslutir við aðrar samlarar, og ikki minst koma í samband við aðrar savnarar, soleiðis at hjálp kann fáast til at fylla ýmsu søvnini. Og man tað ikki eisini vera so, at onkur – sum annars ikki er savnari – sigur heima við onkrum gomlum mynti ella líknandi, og ikki veit reiðuliga, hvørt hetta hevur áhuga hjá nøkrum.

Og so hava savnararnir eisini eina eyka umbering fyri at fara á stevnuna. Umframt at atgongumerkini til stevnuna eru lutaseðil, har ein fartelefon kann vinnast, fáa tey fyrstu 750 á stevnuni eisini eitt sergjørt telefonkort frá Føroya Tele. Hetta kortið verður bert gjørt í 1.500 eintøkum, og 750 av hesum verða so burturlutað á stevnuni.

**Kontant avrokning**

Umframt at stevnan er eitt høvi hjá áhugaðum at síggja hópin av søvnum, sum bæði føroyskir og útlendskir savnarar hava av hesum, verða eisini fleiri onnur spennandi tiltøk á skránni.

Hjá teimum, sum hava slík søvn- og ikki minst hjá teimum, sum kanska hava ein gamlan mynt ella líknandi liggjandi heima, er lítið at ivast í, at eitt hitt mest spennandi á stevnuni er, at tey her hava møguleika at fáa serkøn fólk at virðismeta søvn síni. Tað verða teir báðir, Ole Sembach frá Sembach's og Jan T. Sørensen frá Filatelistisk & Numismatisk Forlag hjástaddir, og einki er at ivast í, at hetta eru menn við drúgvum royndum á økinum.

Eitt er tó, hvat serkunnleikin sigur. Annað er so, hvat veruliga virði á søvnunum er, og eisini hesum fæst greiða á í Norðurlandahúsinum. Her verður nevniliga eisini skipað fyri uppboðssølu av telefonkortum, myntum og pengaseðlum, so hjá teimum, har tað ikki er nóg mikið at vita, hvat savnið er vert, ber eisini til at fáa kontanta avrokning við kassa eitt.

**Stuttligar søgur**

Afturat tí meira monitera partinum av stevnuni, er sjálvsagt møguleiki at kunna seg um ymiskt søguligt viðvíkjandi myntum og telefonkortum.

Bæði leygar- og sunnudagin verður sostatt høvdi at hoyra Valdimar Tómasson greiða frá ymiskum, sum hevur við myntir at gera. Leygardagin hevur hann fyrilestur við heitinum, pengar – hvat er tað - og sunnudagin fer hann so at siga frá ymsum merkisverdum søgum, sum hava við pengar at gera. Eitt nú um tað følsku donsku 2-krónuna og um okkurt fyribrigdi við spedalskum myntum. Sjálvur hevur Valdimar í nógv ár verið íðin savnari, og lítið er at ivast í, at sjálvt royndir savnarar kunnu fáa okkurt nýtt at vita sunnudagin.

Sum sagt, so verður mynt- og telefonkotstevnan leygar- og sunnudagin. Tað eru Myntsavnarafelag Føroya og Teleforlagið hjá Føroya Tele, sum samskipa tiltakið, sum fer av bakkastokki leygarmorgunin klokkan 10. Klokkan 11.00 verður stevnan formliga sett av formanninum í Mentanarnevnd Føroya Løgtings, Annitu á Fríðriksmørk.

# Stuðul til fosturforeldur hækkar

**Landsstýrismaðurin í almannamálum fer at seta í gildi kunngerð, ið hækkar stuðulin til fosturforeldur**

FOSTURFORELDUR
*Eirikur Lindenskov*

Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum, hevur avgjørt at seta í gildi eina kunngerð um samsýning til forsturforeldur, ið hækkar samsýningina til fosturforeldur.

Kunngerðin gevur m.a. heimild til at javna samsýningina, sum hevur verið óbroytt síðani 1993.

Harumframt er sum nakað nýtt møguleiki fyri at falda ásettu samsýningina tríggjar ferðir, um talan er um eitt sera truplt barn, ella sjey ferðir, um talan er um eitt barn, sum er óvanliga trupult, og sum tessvegna krevur heilt serliga røkt frá fosturforeldrunum.

Tann ásetta samsýningin kann eisini sjeyfaldast, um talan er um eitt barn undir eitt ár. Ein trý- ella sjeyfalding av ásettu samsýningini kann veitast í tríggjar mánaðar ísenn. Eftir hetta tíðarskeið skal gerast ein meting av, um tiltakið virkar eftir ætlan, og um ráðiligt er at halda áfram við tiltakinum. Tað eru í løtuni umleið 70 fostur- og umlættingarfamiljur íalt í høvuðsstaðarøkinum og í Klaksvík.

Kunngerðin verður sett í gildi í næstum.

Harumframt arbeiðir Trivnaðarmálaráðið við at gera eina fosturforeldraskipan, sum skal vera galdandi fyri alt landið. Hendan verður væntandi klár at seta í verk um ársskiftið, verður upplýst úr Trivnaðarmálaráðnum.

# Ráðið fyri brekað er nú valt

**Tað er landsstýrismaðurin í trivnaðarmálum, Páll á Reynatúgvu, sum valt hevur ráðið**

RÁÐ FYRI BREKAÐ
*Eirikur Lindenskov*

Sambært reglugerðini eru uppgávurnar hjá Ráðnum fyri brekað at ráðgeva landsstýrinum í øllum almennum málum, sum hava týdning fyri viðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum. Somuleiðis skal ráðið vera ráðgevandi fyri aðrar almennar myndugleikar.

Ráðið fyri brekað kann eisini av sínum eintingum seta fram uppskot til fremjan ella broytingar innan øki, sum viðvíkja livikorum teirra brekaðu og fylgja við og gera metingar um viðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum.

Ráðið fyri brekað hevur tilsamans 7 limir, ið umboða kommunur, Meginfelag teirra brekaðu og landsfyrisitingina.

Marjun S. Olsen, kommunustýrislimur í Vestmanna, er vald eftir tilmæli frá Føroya kommunufelag.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, er valdur eftir tilmæli frá Kommunusamskipan Føroya

MBF hevur tveir limir í ráðnum:Marjun Sigurðsdóttir, sum er formaður í MBF, og tískil føddur limur í ráðnum og Leilu Solmunde, formaður í Giktafelagnum og næstformaður í MBF, ið er vald eftir tilmæli frá MBF.

Harumframt hevur landsumsitingin tvey umboð í ráðnum: Barbara á Tjaldrafløtti, deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, og Kristjan Árnason, fulltrúi í Trivnaðarmálaráðnum.

Ráðslimirnir velja sjálvir formannin, sum verður sjeyndi limurin í Ráðnum fyri brekað.

# Tónleikur yvir um landamørk

**Konsert verður í Turkihúsinum í Leirvík sunnudagin kl 20:30 við Moniku Stauss Joensen, violin, Helene Ringgenberg, kembalo. Willy Gohl og Ólavur Hátún greiða frá**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í hugnaliga umhvørvinum í gamla Turkihúsinum í Leirvík, hava tey høvi at bjóða til eina áhugaverda konsert sunnukvøldið.

Moniku Stauss Joensen, violin og Helene Ringgenberg, kembalo fara at spæla í Bátasavninum í gamla Turkihúsinum í Leirvík. Tær báðar hava havt fleiri konsertir í Sveits og í Føroyum, og síðsta ár vórðu tær bodnar at spæla í USA.

Við á konsertini hesaferð er heimskendi dirigenturin og kórleiðarin Willi Gohl saman við Ólavi Hátún. Teir fara at greiða frá samstarvi teirra, sum nú hevur 30 ár á baki. Tónleikaáhugað hava seinastu mongu árini havt høvi at upplivað fleiri av fremstu kórverkum tónleikasøgunnar framførd her á landi við Havnarkórinum undir leiðslu Willi Gohls.

Á konsertini verða verk av Bach, Telemann og Mozart at hoyra.



# Fara nú at gera parkeringspláss

**Fyrireikingarnar til víðkan av parkeringsplássunum við flogvøllin í Vágum eru byrjaðar, og miðað verður í móti at fáa tilboðini inn heilt skjótt**

PARKERINGSVIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*

*Kanningar av lendinum, har nýggju parkeringsplássini við flogvøllin skulu vera, eru gjørdar, og farið verður ætlandi undir sjálvt arbeiðið fyrsta dagin*
*Mynd: Edvard Joensen*



Vágar:
Arbeiðið at gera parkeringsplássini við flogvøllin er boðið út, og miðað verður ímóti, at tilboðini eru komin inn, áðrenn hesin mánaðin er farin.

Ætlanin gongur út upp á at gera parkeringspláss eystan fyri verandi innkoyring frá landsvegnum oman til terminalin við flogvøllin. Talan er um at gera umleið hálvtriðjahundrað til trýhundrað parkeringspláss aftur at teimum gott tveyhundrað, sum í løtuni eru tøk.

Fyrireikandi kanningar av lendinum hava verið. Grivið er ymsastaðni, har nýggju parkeringsplássini skulu vera, fyri at kann dýpið og undirlendið annars.

Ætlanin umfatar umframt sjálv parkeringsplássini eina rundkoyring við landsvegin, flytan av verandi vegi umframt ein nýggjan veg niðan fyri nýggju parkeringsplássini.

Verandi omankoyring til flogvøllin skal flytast eitt sindur, so vísningurin verður meira vesturyvir. Nýggju parkeringsplásini fara at liggja frá verandi vegi oman til terminalin og einar 270 metrar eystureftir móti Vatninum.

Síðan verður ein nýggjur vegur gjørdur fram við niðara enda millum nýggju parkeringsplássini og hangarin.

Hvussu verður við sjálvari rundkoyringini, er ikki heilt greitt enn. Mett verður, at hon fer at kosta út móti einari millión krónum ella so. Og samlaða játtanin fyri allla ætlanina er upp á fimm milliónir krónur. Tí verður mett, at kanska verður neyðugt at bíða við rundkoyringini í fyrsta umfari.

Tá kann skjótt henda, at tað verður, sum orðatakið sigur, at tað, sum fyrst kemur í drag, kemur seinni í lag. Tí tær fimm milliónirnar, sum avsettar eru, skulu brúkast í hesum fíggjarárinum, og sum Sosialurin skilir, er eingin króna sett av til hetta arbeiðið á komandi fíggjarlóg.

# Stór síl

**Tíðin, tá gingið verður við tráðu kring føroysku vøtnini, er við at vera av í ár. Tó eru menn enn at síggja við Leynavatn og í Saksun**

SÍLAFISKING
*Edvard Joensen*



*Andrias við báðum teimum stóru sílunum, hann fekk ávikavist á Leitisvatni og Hvilvtkinnavatni*
*Mynd: Edvard Joensen*

Miðvági:
Sílatíðin í ár er av. Fyrsta september var ikki longur loyvt at fiska í áum og vøtnum, uttan á Leynavatni og í Saksun, sum hava seravtalur.

Nógvar eru kendu søgurnar um stuttleikafiskararnar, sum altíð missa teir stóru fiskarnar. Ofta eru teir øgiligir, alt eftir, hvussu ofta søgan verður søgd.

Men so eru eisini teir, sum veruliga fáa stórar fiskar. Eisini á støðum, har ikki er so vanligt við støðd, men heldur tali.

Eitt slíkt vatn er Leitisvatn ella Sørvágsvatn, alt eftir, hvørju megin ein stendur. Har eru sílini mong. Øgiliga nógv í tali, heldur onkur, og av tí sama er støddin einki at reypa av soleiðis.

Tó hendir seg, at okkurt stórt síl er ímillum, og viðhvørt kunnu tey gerast mestsum yvirvaksin. Ivaleyst eru tað slík, sum »fakmenninir« nevna kannibalar. Tey sum leggja seg eftir at eta onnur síl.

Eitt slíkt síl fekk Andrias Johannesen í Miðvági nakað herfyri, tá hann var við tráðu á Leitisvatni. Sílið, hann fekk, var heilar 60 centimetrar langt og vigaði 200 gram yvir seks pund.

Nú eru Vágar rímiliga væl fyri, tá hugsað verður um vøtn til sílafisking. Fjallavatn er eisini har, umframt onnur smærri vøtn. Eitt teirra er Hvilvtkinnavatn, sum mangan verður sagt at hýsa nøkrum av størstu sílunum í landinum, hóast tey aftur fyri eru fá í tali.

Men eisini har var Andrias Johannesen heppin. Har fekk hann eitt síl, sum var 57 centimetrar til longdar og vigaði hálvtfjórða pund.

SKÁLAFJARÐAR MÁLINGAHANDIL
Í dag 20. september fylla vit
30 ár
Í hesum sambandið lata vit
30 %
av allari kontantari sølu
Harumframt bjóða vit kaffi og kransakøku
Skálafjarðar Málingahandil
Postboks 69
FO-600 Saltangará
Tlf. 447777